

# Sansir søkja fyriskipara

Sansir søkja fyriskipara, sum skal skipa okkara arbeiði innanhýsis, fáa tað at glíða væl, betra um arbeiðsgongdir og tryggja, at arbeiðsorkan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Fyriskiparin skal eisini røkja samstarvið við okkara veitarar, gera avtalur við veitararnar, fáa tilboð til vega og tryggja, at tænasturnar eru í lagi og verða veittar rættstundis.

Tú verður ein lyklapersónur í fyritøkuni. Tú skalt síggja til, at arbeiði verða gjørd skynsamt og úrslitagott. Tú ert væl skipað/ur, hugsar logiskt og hevur gott yvirlit. Tú dugir væl at samskifta við fólk og hevur høgan sosialan intelligens.

Tú hevur hægri útbúgving ella royndir á økinum.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 38 starvsfólkum í trimum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum. Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Fyriskiparastarvið er eitt leiðarastarv, tí fært tú sjálvandi eina góða løn.

Umsóknin skal sendast við telduposti til Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo ella Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Vit skulu hava umsóknina í seinasta lagi kl. 16.00 mánadagin 12. november.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Høgna á tel 220401 ella Lenu á tel 218370. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Høgna ella Lenu.

SANSIR
sansir.fo

XL BYG. Balslev.fo

## Vit søkja eftir
### sølufólki til køksdeildina

Sí lýsing á heimasíðu okkara

www.balslev.fo

Sun Investments S.L

Húsasøla frá Spanien

www.suninvestmentsl.com
Linda Ros · Tel 0034 646 930 757

## Eykafloksting

Eykafloksting verður sunnudagin 28.10.2007 kl. 15.00 á Parnassinum á Hotel Hafnia.

Á skránni:
Uppstilling til fólkatingsvalið
Ymiskt

Møtið fjølment.

www.tjodveldi.fo TJÓÐVELDI

MIÐFLOKKURIN

- verjir tey veiku
- raðfestir rætt
- á tryggum grundarstøði

hvørt vikuskifti í Sosialinum

MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI



## Profilurin

**Navn:** Charlotta á Váli Olsen

**Aldur:** 53 ár

**Bústaður:** Tórshavn

Eftir at hava arbeitt sum útbúgvin pedagogur í nærum 30 ár, avgjørdi eg at royna okkurt heilt annað, og bleiv tað í Handil og Kaffi á Vaglinum sum seljari og servitrisa.

Tað sum liggur hjartanum nærmast, eru tey veiku í samfelagnum; børn, eldri og øll, íð bera brek. Hesin síðsti bólkurin hevur aloftast, hóast sítt brek, so nógv at geva og læra okkum. Tey eldru hava bygt samfelagið til eitt vælferðarsamfelag. Og børnini eru framtíðin. Tí eiga vit at fara væl um hesar bólkar! Samfelagið er nógv útbygt seinastu árini, nógvir stovnar eru bygdir til bæði børn, eldri og tey, íð bera brek. Og tað er gott - tað skal til.

Men! Eitt sum haltar, er virðið, sum samfelagið setir á tey, ið eru um hesi veiku. Tey brúka eina ótrúliga orku, í tí arbeiði tey gera; brúka seg sjálvan sum amboð. Men skal sparast, eru hesi tey fyrstu, íð verða rakt. Og lønin er langt frá virðinum av arbeiðinum. Tískil verða hesi fólk hart rakt av strongd og ørmaktan. Hetta rakar so aftur teir bólkar, tey eru um. Hetta má fáa eina vend! Samfelagið má síggja virði í hesum arbeiðsbólkum, og løna teimum eftir tí.

Eg stuðli Miðflokkin, tí hann rúmar øllum mínum áhugamálum, bæði innan arbeiði og frítíð -og so byggja vit á sama grundarlag!

### Visti tú at...

- Ein dagstovnaleiðari fær minni løn enn ein lagurarbeiðari?
- Formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, upplýsti í Løgtinginum hósdagin, at gomul og eldri í dagsins Føroyum, verða koyd í song á hálvum degi við blæðu á.
- Fíggjarnevndarformaðurin í farnu viku upplýsti Løgtinginum, at tíðin er komin at styrkja barnafamiljurnar, tí tað hevur samgongan ikki gjørt í nógv ár.

www.midflokkurin.fo